Bilar

Nr. 179 • hósdagur • 19. september 2002 • 76. árg.




*Ferðaliðið uttanfyri NOR-Aalborg A/S. Frá vinstru: Jan Jacobsen frá Bilv.v/ Hans J. Kollsker, Jóhannes Johannesen, Ólavur Hansen, Heri Weihe frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Hans J.Kollsker stjóri, Oystein Petersen frá Bilumvæling, John Ellefsen frá Tryggingarfelagnum Føroyar, Petur Martin Johansen frá Fa. Billutir, Eyðbjørn Hansen stjóri, Eirikur Ó. Simonsen frá Tekniska Skúla, Tage Johansen frá NOR, Eyðun Viðstein frá Bilasøluni v/ Ø. Johannesen, Brynleif Askildsen frá Bilskrokk og André Wraae frá Reyni Service*

# Fa. Billutir í Kollafirði – kunningarferð í Danmark

**Frá 2. til 5. mai í ár skipaði Fa.Billutir í Kollafirði, saman við NOR, Nordjysk Reservedelslager, fyri einum áhugaverdum túri fyri fólki í føroysku bilvinnugreinini. Fyriskiparin av túrinum, Petur Martin Johansen, letur væl at slíkum uttanlandatúrum**



*Finn Vesterled, frá Sika-Beton (uttast til vinstru), greiðir her frá teirra framleiðslu. Hinir á myndini er frá vinstru: Jóannes Johannesen, Eyðbjørn Hansen, André Wraae, danskur bussførari, Hans J.Kollsker, Oystein Petersen og Brynleif Askildsen*

FERÐAFRÁSØGN
*Magnus Gunnarsson*

Í vár, hósdagin 2. mai, meðan meginparturin av samferðsluni lá lamin, orsaka av verkfalli, fór eitt ferðalag, tilsamans 15 fólk, við báti úr Vágsbotni til Miðvágs, júst sum í gomlum døgum. Við í ferðalagnum vóru bilhandlarar, verkstaðseigarar og plátusmiðir, eisini vóru umboð fyri Tekniska Skúla og Tryggingarfelagið Føroyar. Ferðin úr Vágum gekk um altjóða flogvøllin í Kastrup til Aalborg, har Fa.Billutir bjóðaðu til ein døgurða á hotellinum, har tey skuldu búgva.

Fríggjadagin stóð ein bussur klárur at koyra ferðalagið til framleiðsluhøllina hjá NOR-Dronninglund. Har sóu tey, hvussu teir framleiddu karossarílutir, so sum skermar frontplátur og annað. Sum eitt dømi nevndu teir, at tað kann kosta upp til eina kvart millión at gera ein form til at pressa tær sløttu jarnpláturnar til ein lidnan skerm.

Meðan ferðalagið var hjá NOR-Dronninglund, fingu tey vitjan av Finn Vesterled, frá Sika-Beton, ið sýndi fram teirra framleiðslu. Teir gera til dømis sealara og tettning til plátulutir á bilum. Hann legði serliga dent á at vísa, hvussu teirra framleiðsla skuldi brúkast rætt. Seinni um dagin vóru tey á útferð á Aalborg leiðini. Um kvøldið bjóðaði NOR til ein døgurða.

Leygardagin vóru tey og vitjaðu goymsluna hjá Pajo Hobro A/S, ið er ein av mest framkomnu autogrossistum. Teir hava alt frá boltum og skrúvum til stór maskinamboð. Goymslan er uppá 100.000 lutir. Ein sera áhugaverd vitjan.

Fyriskiparin av túrinum, Petur Martin Johansen frá Fa.Billutum, sigur at endamálið við slíkum túrum er, at brúkarin sær, hvussu lutirnir varða gjørdir og lærir at brúka tey ymisku produktini rætt. Eisini sosiala samveran hevur stóran týdning, Tað at vera saman í nakrar dagar, burtur frá tí dagliga "resinum" og læra hvønn annan betur at kenna. Go-kart koyring royndu tey eisini.

Sunnudagin 5. mai kom ferðalagið heimaftur, eftir ein góðan túr og vórðu tey aftur mint á verkfallið, tá tey máttu fara um Vestmannasund í einum útróðrarbáti.

Fa. Billutir í Kollafirði bleiv stovnað í 1993, við tí endamáli at útvega bíligar eykalutir til bilar. Fyritøkan er bæði smásøla og heilsøla, ið selur eykalutir um alt landið. Stjóri og eigari av fyritøkuni er Petur Martin Johansen.



*NOR framleiða plátulutir til tey ymisku bilmerkini. Kvaliteturin er fult á hædd við teir originalu plátulutirnar. Á myndini eru frá vinstru: Brynleif Askildsen, Tage Johansen, sølustjóri hjá NOR, André Wraae, Petur Martin Johansen, Hans J. Kollsker, Jan Jacobsen og Eirikur Ó. Simonsen*



*Samskiparin av kunningarferðini, Petur Martin Johansen og sølustjórin hjá Pajo Hobro A/S er Georg Dahl*



# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

**FORD ESCORT VAN 1,6**
Árg 1996, Km 75.000.
Kr. 65.000.



**PEUGEOT 406 2,1TD**
Árg 1997, Km 136.000.
Kr. 143.000.



**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1995, Km 60.000.
Kr. 67.000.



**AUDI 100**
Árg 1987, Km 290.000.
Kr. 25.000.



**FORD ESCORT 1,8 DIESEL**
Árg 1995, Km 152.000.
Kr. 65.000.



**OPEL ASTRA 1,7D**
Árg 1996, Km 156.000.
Kr. 78.000.



**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1995, Km 109.000.
Kr. 67.000.



**OPEL ASTRA 1,7D**
Árg 1997, Km 101.000.
Kr. 89.000.

**NISSAN MICRA**
Árg 1988, Km 187.000. Kr. 12.000.



**NISSAN TERRANO 2,7TD**
Árg 1996, Km 65.000.
Kr. 119.000.



**FIAT MAREA 1,6**
Árg 1996, Km 70.000.
Kr. 85.000.



**NISSAN PRIMERA 2,0**
Árg 1997, Km 45.000.
Kr. 105.000.



**OPEL VECTRA 2,0DTI**
Árg 1998, Km 96.000.
Kr. 130.000.



**TOYOTA AVENSIS 2,0 DIESEL**
Árg 2000, Km 85.000.
Kr. 168.000.



**PEUGEOT 306 1,9TD**
Árg 1997, Km 150.000.
Kr. 90.000.



**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1998, Km.  Kr. 92.000.



**OPEL ASTRA 1,6**
Árg 1997, Km 58.000.
Kr. 78.000.



**TOYOTA CARINE E 1,6**
Árg 1996, Km 80.000.
Kr. 78.000.



**OPEL ASTRA 1,6 ST.CAR**
Árg 1993, Km 116.000.
Kr. 55.000.



**NISSAN PRIMERA 1,6**
Árg 1998, Km 70.000. Kr. 125.000.



**TOYOTA CARINE E 1,6**
Árg 1997, Km 50.000.
Kr. 89.000.



**OPEL ASTRA 1,7DT**
Árg 1996, Km 95.000. Kr. 78.000.



**OPEL VECTRA 1,8**
Árg 2000, Km 22.000. Kr. 174.000.



**PEUGEOT 106D**
Árg 1997, Km 71.000. Kr. 65.000.



**OPEL ASTRA CLUB 1,6 ST.CAR**
Árg 1996, Km 98.000. Kr. 70.000.

P/F Meinhardt Arge
Tel 345400 nissan@nissan.fo heimasíða: www.nissan.fo



**FORD FOCUS  >> GHIA <<**
Árg mar.99, Km 51.800. Sera væl hildin, sentrallás, CD anlegg, hita í setrunum, el-síðuspegl v.m..
Kr. 135.000.



**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 >>DIESEL <<**
Árg okt.95, Km 104.500.
Vælhildin. Kr. 75.000.



**DAIHATSU SIRION  5/HURÐAR**
Árg apr. 2000, Km 51.000.
Vælhildin. Kr. 80.000.



**DAEWOO NUBIRA 1.6 STATIONCAR**
Árg Juni.98, Km 29.000. Sera vælhildin. El rútar Fr. Takboylar, Radio við bandspælara, Centrallás, Sleipikrók.
Bert km 29.000. Kr. 96.000.



**ROVER 620 TI  200 HK**
Árg Juli.99, Km 72.000. Sera vælhildin Leður inntrekk Aircon.C.D.Anlegg fjarðstýrt centrallás El.rútar El.spegl Anti spin v.m.. Kr. 220.000.



**SRENAULT SCENIC 1.6  95 HK**
Árg Nov. 99, Km 45.000. Sera vælhildin 2.El. sóltak- El. rútarmjørkalyktir- Spoylara aftan- Alufelgur og sleipikrók..
Kr. 148.000.

P/f. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650




LÝSIÐ
við



brúktum
bilum
í Sosialinum